# Fyrsta Grand-prix renningin

Um vikuskiftið varð fyrsta umfar í grand-prix renningini á skránni. Høvið til hetta var bygdarstevnan á Strondum, og var talan um fyrsta av íalt seks umførum. Næsta umfarið verður um tvær vikur á norðoystevnu.

Líkindini at renna vóru ikki av teimum besta. Regn og vindur var, men hóast hetta, so vóru einir 70 luttakarar møttir upp til kappingina.

Hjá monnunum varð Guttorm Sørensen skjótasti luttakarin. Hann vann við einum knøppum minutti niður til Sam Vang, sum í eini kapprenning um næsta plássið megnaði at basa Jógvan Johan Lorentzen.

Hjá kvinnunum var tað Brynhild Absalonsen, sum kom fyrst og mál. Hon var hálvan minutt undan Ellu Joensen úr Kollafirði, og síðani var eitt fitt petti niður til næstu rennararnar.

Úrslitini av kapprenningini vórðu annars hesi:

**Gentur -7 (f. 1998-) - 400 m**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 1 | 54 | Paulina Fuglø | 1999 | Treysti | 40 |
| 2 | 2 | 27 | Miriam Bethuelsdóttir | 1999 | Treysti | 34 |

**Dreingir -7 (f. 1998-) - 400 m**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 1 | 42 | Ari Olsen | 1998 | Strendur | |
| 2 | 1 | 45 | Julian Gregersen | 1998 | Treysti | 40 |
| 3 | 1 | 46 | Hørður Egilsson | 1998 | Frælsi | 34 |
| 4 | 1 | 53 | Jónas F. Berthelsen | 1998 | Strendur | |
| 5 | 2 | 4 | Andrias á Marknagili | 1999 | Klaksvík | |
| 6 | 2 | 15 | Julian Mikkelsen | 2000 | Strendur | |
| 7 | 2 | 19 | Fríði Magnussen | 2000 | Bragdið | 30 |
| 8 | 2 | 20 | Karl Martin Johansen | 1999 | Strendur | |
| 9 | 2 | 24 | Aksel Jacobsen | 1999 | Strendur | |
| 10 | 2 | 27 | Jákup Anthoniussen | 1999 | Morskranes | |

**Gentur -10 (f.1995-97) - 1,370 km**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 6 | 39 | Bjørk Reynagarð Svabo | 1996 | Frælsi | 40 |
| 2 | 7 | 22 | Anna Jákupsdóttir | 1995 | Frælsi | 34 |
| 3 | 7 | 38 | Jórunn Hansen | 1995 | Roysnið | 30 |
| 4 | 7 | 39 | Barbara Debes Eiriksfoss | 1995 | Bragdið | 26 |
| 5 | 8 | 1 | Edna Maria Debes | 1997 | Bragdið | 23 |
| 6 | 8 | 3 | Ása Egilstoft Nielsen | 1997 | Frælsi | 20 |
| 7 | 8 | 4 | Ata Joensen | 1997 | Skáli | |

**Dreingir -10 (f. 1995-97) - 1,370 km**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 5 | 43 | Sølvi Egilsson | 1995 | Frælsi | 40 |
| 2 | 5 | 49 | Regin Joensen | 1995 | Bragdið | 34 |
| 3 | 6 | 0 | Betuel Hansen | 1997 | Roysnið | 30 |
| 4 | 6 | 3 | Einar Gregersen | 1995 | Treysti | 26 |
| 5 | 6 | 9 | Heðin Gregersen | 1996 | Treysti | 23 |
| 6 | 6 | 25 | John Viljam Johannesen | 1995 | Treysti | 20 |
| 7 | 6 | 28 | Steingrímur Hallsson | 1997 | Bragdið | 18 |
| 8 | 6 | 32 | Beinir Johannesen | 1997 | Treysti | 16 |
| 9 | 6 | 36 | Janus Egilstoft Nielsen | 1996 | Frælsi | 14 |
| 10 | 6 | 44 | Kjartan Johansen | 1996 | Strendur | |
| 11 | 7 | 10 | Marnar Poulsen | 1995 | Strendur | |
| 12 | 7 | 19 | Eyðbjørn Eiriksson | 1996 | Innan Glyvur | |
| 13 | 7 | 25 | Osvald á Marknagili | 1996 | Treysti | 12 |
| 14 | 7 | 28 | Rani H. Fonn | 1996 | Strendur | |
| 15 | 8 | 4 | Óli Abrahamsen | 1995 | Strendur | |

**Gentur -13 (f. 1992-94) - 2,740 km**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 11 | 54 | Rebekka Fuglø | 1993 | Treysti | 40 |
| 2 | 12 | 2 | Vár Gregersen | 1993 | Frælsi | 34 |
| 3 | 12 | 16 | Rannvá Djurholm | 1992 | Bragdið | 30 |
| 4 | 13 | 25 | Silja Niclasen | 1993 | Frælsi | 26 |
| 5 | 14 | 37 | Monika Biskopstø | 1994 | Treysti | 23 |
| 6 | 14 | 49 | Vilbjørg Johannesen | 1992 | Treysti | 20 |
| 7 | 14 | 56 | Sissal Skaale | 1994 | Bragdið | 18 |

**Dreingir -13 (f. 1992-94) - 2,740 km**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 10 | 53 | Eli Falkvard | 1992 | Frælsi | 40 |
| 2 | 11 | 32 | Rúni Seloy | 1994 | Bragdið | 34 |
| 3 | 11 | 52 | Rógvi Egilstoft Nielsen | 1992 | Frælsi | 30 |
| 4 | 12 | 0 | Òlavur Mikkelsen | 1992 | Strendur | |
| 5 | 13 | 8 | Rói Holgarson | 1992 | Vestmanna | |
| 6 | 14 | 17 | Sámal Fríðriksson Nielsen | 1994 | Tórshavn | |
| 7 | 16 | 20 | Janus Gudmundsen | 1993 | Frælsi | 26 |

**Gentur -17 (f. 1988-91) - 2,740 km**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 11 | 20 | Bjørk Herup Olsen | 1991 | Bragdið | 40 |

**Dreingir -17 (f. 1988-91) - 2,740 km**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 10 | 19 | Jan Elmar Sørensen | 1991 | Treysti | 40 |
| 2 | 10 | 44 | Daniel Djurhuus Rein | 1990 | Bragdið | 34 |
| 3 | 10 | 51 | Tummas Justinussen | 1990 | Bragdið | 30 |

**Kvinnur opin bólkur (f. -1987) - 6,850 km**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 34 | 23 | Brynhild Absalonsen | 1980 | Bragdið | 40 |
| 2 | 34 | 51 | Ella Joensen | 1987 | Kollafjørður | |
| 3 | 40 | 46 | Maria Jacobsen | 1974 | Frælsi | 34 |
| 4 | 46 | 54 | Hanna Maria Niclasen | 1958 | Frælsi | 30 |

**Kvinnur veteranar (f. -1959) - 6,850 km**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 46 | 54 | Hanna Maria Niclasen | 1958 | Frælsi | 40 |

**Menn opin bólkur (f. -1987) - 6,850 km**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 23 | 52 | Guttorm Sørensen | 1968 | Treysti | 40 |
| 2 | 24 | 45 | Sam Vang | 1970 | Bragdið | 34 |
| 3 | 24 | 51 | Jógvan Johan Lorenzen | 1980 | Treysti | 30 |
| 4 | 24 | 57 | Sigurð B. Justinussen | 1967 | Bragdið | 26 |
| 5 | 25 | 21 | Jóan Karl Joensen | 1987 | Bragdið | 23 |
| 6 | 26 | 13 | Trygvi Hansen | 1966 | Bragdið | 20 |
| 7 | 26 | 22 | Borgar Biskopstø | 1962 | Treysti | 18 |
| 8 | 26 | 55 | Eyðtór J. Joensen | 1967 | Bragdið | 16 |
| 9 | 27 | 15 | Pól Sundskarð | 1957 | Treysti | 14 |
| 10 | 27 | 39 | Jósvein Herup Olsen | 1958 | Bragdið | 12 |
| 11 | 27 | 59 | Michael Feldballe | 1973 | Bragdið | 10 |
| 12 | 29 | 39 | Sølvi R. Hansen | 1970 | Roysnið | 9 |
| 13 | 30 | 21 | Símun Joensen | 1961 | Bragdið | 8 |
| 14 | 30 | 28 | Flemming Petersen | 1960 | Roysnið | 7 |
| 15 | 31 | 30 | Niels Hansson | 1964 | Bragdið | 6 |

**Menn veteranar (f. -1959) - 6,850 km**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn Eftirnavn | Árg. | Felag | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 27 | 15 | Pól Sundskarð | 1957 | Treysti | 40 |
| 2 | 27 | 39 | Jósvein Herup Olsen | 1958 | Bragdið | 34 |

## Venjaraskeið til hondbóltin

Tey bæði komandi vikuskiftini fer HSF at halda venjaraskeið fyri føroyskum hondbóltsvenjarum.

Tað verður danski instruktørurin, Sørensen Simonsen, sum er sonevndur breiddakonsulentur fyri DHF. Hetta inniber eisini, at venjaraskeiðið hesaferð ikki verður elitumerkt, men heldur er vent mótvegis ungdómsvenjarum, har elitan tó sjálvandi eisini fær nakað burtur úr venjingunum.

Evnini, sum arbeitt verður við, eru fyrst og fremst tekniski parturin av spælinum umframt verju- og kontrafasan.

Talan er um skeið, sum varar tveir dagar. Í skeiðstilfarinum verður sagt, at eisini venjarar hjá eldru liðum kunnu fáa stórt gagn av hesum. Hetta tí venjingarprinsippini, sum verða nýtt, uttan stórvegis hóvasták kunnu førast yvir á vaksnamannahondbólt.

-jm

## Bogi vann í Danmark

Seinasta vikuskifti tók skálamaðurin, Bogi Kristiansen, lut í stórari súkklukapping í Danmark. Súkklaðir vórðu 100 kilometrar eftir landavegnum, og sum skilst var talan um harða kapping. Eingin súkklari megnaði tó veruliga at skræða seg leysan, og í einum sera spennandi endaspurti eydnaðist tað Boga at koma fyrstur um málið.

Bogi verður í summar partur av føroyska Oyllandsliðnum á Hetlandi.

-jm

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

-har tað hendir

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin